VIÐMERKINGAR

# Almennur fyrispurningur til Føroya Landfúta

**Heri Simonsen**

Háttvirdi Mogens N. Christensen, landfúti.

Undirritaði hevur fingið eitt skjal frá Ougaard, varafúta, sum boðar frá, at ferðslulógin er ikki galdandi á øllum gøtum og vegkryssum í Føroyum! Eg fari at heita á tygum og lesarnar hjá hesum blaði, um at lesa hjáprentaða skjalið.

Skjalið sigur, at ferðslulógin frá 1. juli 2000 er galdandi á Hoyvíksvegnum og á Óðinshædd í Havn, men er *ikki* galdandi á Varðagøtu og í Brøttubrekku í Havn. Bilførarar mugu passa sær løgir 10 ferðir frá Óðinshædd og út á Hoyvíksvegin. Men kunnu gott koyra fram eftir fummum frá Brøttubrekku og inn á Varðagøtu. Hetta letur seg gera, sjálvt um øll ferðsluskelti og allar ferðslumarkeringar, ið verða uppsettar, verða einans uppsettar, um Føroya Løgregla – t.e. tygum harra landfúti – góðtekur hesar ferðsluskeltingar og ferðslumarkeringar, eisini á Varðagøtu og í Brøttubrekku! Og í 2000 vóru hvørki skelti ella markering við Óðinshædd/Hoyvíksvegin!

Tí er tað, at eg spyrji tygum harra landfúti. Kunnu vit allir bilførarar á Føroya landi fáa ein lista frá tygum yvir teir vegir og tey vegkryss her á Føroya landi, har ferðslulógin er galdandi? Kunnu vit somuleiðis fáa ein lista yvir teir vegir og vegkryss her á Føroya landi, har ferðslulógin *ikki* er galdandi?

Vit vita sum er, at ferðslulógin ikki er galdandi fyri Varðagøtu og Brøttubrekku, men at hon er galdandi fyri Hoyvíksvegin og Óðinshædd. Best hevði verið at fingið eitt fullfíggjað yvirlit, ein reyðan og ein grønan lista, hvar ferðslulógin er galdandi, og hvar hon *ikki* er galdandi!

Og so ein spurning aftrat til tygum harra landfúta. 20. juni 1988 bleiv eg yvirkoyrdur undir arbeiði, sum postmaður. Eg svevaði millum lív og deyða í 14 dagar og varð sjúkrameldaður í 4 mánaðir.

Eg fekk ongantíð nakað fyri »tort og svie« tíansheldur nakað endurgjald, tí tit funnu ikki persónin, sum rendi á meg og arbeiðsakfar mítt. Eg ætlaði at enda bara at spyrja, um nakað nýtt er hent í tí málinum?

Takk fyri tíð tygara.

**Avrit av skrivi frá landfogeden**

»Det fremgår af Deres brev av 1. august 2002, at De er uforstående over for, at De er blevet tiltalt for overtrædelse af færdselsloven, en NN ikki er blevet tiltalt. De har anført, at I begge har været involveret i et færdselsuheld, og at de to situationer er ens.

Beslutningen om at rejse tiltale for overtrædelse af færdselsloven og eventuelt nedlægge påstand om betinget frakendelse af førerretten er en meget konkret afgørelse. Tiltalespørgsmålet afhænger således, af de konkrete omstændigheder i hver enkelt sagt. Der kan foreligge undskyldende omstændigheder, f.eks. i form af dårlige oversigtsforhold på et uheldssted, der gør, at forholdet ikke kan anses for uagtsomt og dermed ikke er en overtrædelse af færdselsloven.

NN var involveret i et færdselsuheld i krydset Brattabrekka/Varðagøta, hvor der er meget dårlige oversigtsforhold. Efter min opfattelse gør disse omstændigheder sig ikke gældende i krydset Óðinshædd/Hoyvíksvegur, hvor De var involveret i et færdselsuheld. Derfor har jeg ikke bedømt de to sager ens.

Det bemærkes, at retten skal tage stilling til spørgsmålet, om De har overtrådt færdselsloven, og hvilke konsekvenser det i givet fald skal have.

Finn Ougaard, fg.«




V SKIF LK

TIL U GE KING SMS





Mikudagin 16. oktober 2002

TÝSKLAND - FØROYAR

**Ferðing:**
Ferðið verður úr Føroyum til Hannover tann 13. okt. og heimaftur til Føroya eftir dystin tann 16. okt.

**Íroknað prísin er:**
Flogferð Føroyar - Hannover - Føroyar.
Innivist í 3 nætur á hotel v/morgunmati,
2 útferðir, atgongumerki til dystin,
bussflutningur í Hannover og
ferðaavgjøld.

**Grandhotel Mussmann******
kr. 6.190
*Fyri hvønn í dupultkamari*
kr. 6.790
*Fyri hvønn í einakamari*

**Hotel Konighof am Funkturn*****
kr. 5.770
*Fyri hvønn í dupultkamari*
kr. 6.545
*Fyri hvønn í einakamari*

Túrurin kann bileggjast hjá Atlantic Airways á 34 10 40

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Select

**Varaleiðari!**

Søkt verður eftir varaleiðara til Shell-støðina við Norðara Ringveg, í Havn, at byrja frá 15. oktober ella sum skjótast.

***Starvið:***
Starvið umfatar í høvuðsheitum, at hava ábyrgdina av innkeypinum, vøruuppfylling og reingerðini. Viðkomandi verður eisini í staði leiðarans, tá ið hesin er burturstaddur.

***Eginleikar:***
Vit ímynda okkum at umsøkjarin hevur royndir innan handil hetta er tó ikki eitt krav, annars

- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar

***Løn:***
Løn sambært útbúgving og royndir.

***Umsóknir:***
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til: Shell-støðin, Norðari Ringvegur, Smoga 188, Fo-110 Tórshavn, innan 10. oktober. Eru spurningar viðvíkjandi starvinum, vinarliga vendi tykkum til Hans Godtfred Thomsen.

Shell-støðin við Ringvegin er fyri 2 mánaðum síðani gjørd um til eina Select-støð. Hetta merkir at vit nú baka breyð, rundstykkir og wienarbreyð sjálvi. Eisini fáast tær vælsmakkandi Select pylsurnar. Umframt hetta er nú eisini størri úrval av matvøru.

www.shell.fo




FILMSTEIGURIN

# xXx – Tripple X

xXx – Xander Cage, er ein respektleysur og antiautoriterur ævintýrari, sum livir og andar fyri spennandi uplivingum. Men í National Security Agence hevur eftirlitsmaðurin Gibbons ein trupulleika. Í Prag eru fleiri eftirlitsmenn beindir burtur, meðan teir hava kannað Anarchy 99 – ein bólkur av fyrrverandi russiskum hermonnum, sum stýra undirverðini við eini harðari hond. Kanska Xander við sínum tatoveraðu yvirarmum og krúnrakaða skalla hóskar betri inn… Einasti trupulleikin er bara, at tað er einki, ið Xander heldur vil, enn at geva Gibbons fingurin. Tað er tó heilt inntil hann fær valið ímillum ein túr til Prag og 30 ár handan rimar…





# Stuart Little 2

Nú er Stuartl Little vorðin ein rættiligur partur av familjuni Little, sum oman á tað heila hevur fingið ein familjulim afturat – lítlusystrina Martha. Hann koyrir í skúla í sínum lítla reyða bili, meðan John ansar eftir honum frá síðulinjuni. Men hóast alt hetta kennir hann seg framvegis eitt sindur uttanfyri. Hann kann ikki spæla fótbólt saman við ivnunum, og tá hann flýgur í modelflúgvaranum runt í húsinum ger hann nógvar stórar skaðar.

Stutt sagt: Stuart saknar ein vin á egnari støðd, sum hann kann spæla við.

Og so ein dag, tá hann koyrir einsamallur heim frá skúla, kemur hon bókstaviliga dettandi niður frá himlinum. Tað er ein lítil spurvur, Margalo, sum lendir við síðuna av honum á forsetrinum. Falcon, ein óndur rovfuglur, er eftir henni. Stuart tekur hana sjálvandi við heim, og har hittir hon øll í familjuni Little, sum er blíð og týð ímóti henni.

Men Margalo hevur ein loynidóm, og er komin við eini goymdari ætlan. Tá hon á ein gátuføran hátt verður burtur, noyðist Stuart, við hjálp frá Snebold, fara út á vandamiklasta ævintýrið í sínum lívi og bjarga henni úr klørnum á tí ræðuliga Falcon. Tað er ein stór uppgáva hjá eini lítlari mús við stórum hjarta. Men sum Stuart sigur: »Tá tú ert vinur við Stuart Little, so hevur tú fingið ein vin fyri lívið«.






**Frumsýning**
Fríggjadagin 04.10. kl. $21^{00}$ Fríggjadagin 04.10. kl. $23^{30}$
Leygardagin 05.10. kl. $21^{00}$ Leygardagin 05.10. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 06.10. kl. $20^{00}$ Sunnudagin 06.10. kl. $22^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo





**Frumsýning – Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 04.10. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 04.10. kl. $19^{00}$
Leygardagin 05.10. kl. $17^{00}$ Leygardagin 05.10. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 06.10. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 06.10. kl. $18^{00}$





Fríggjadagin 04.10. kl. $23^{00}$ Leygardagin 05.10. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 06.10. kl. $19^{15}$





Fríggjadagin 04.10. kl. $20^{30}$ Leygardagin 05.10. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 06.10. kl. $22^{00}$





Fríggjadagin 04.10. kl. $18^{30}$ Leygardagin 05.10. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 06.10. kl. $17^{15}$